# Frankie goes to HOLLYWOOD

**HØGNI HOYDAL**
løgtingsmaður



**– Landsstýrið nýtti ikki fjaldar bandupptakarar, og danska stjórnin hevur ongantíð hugsað um vælferðina hjá føroyskum bygdafólki í samráðingunum um fullveldi. Hví borðreiðir fyrrverandi danski løgmálaráðharrin, Frank Jensen, so við slíkum søgum? Og hvat hevur hann at fjala, spyr Høgni Hoydal í hesum aftursvari til viðtal við fyrrverandi danska løgmálaráðharran, Frank Jensen í Sosialinum herfyri**

Undirritaði og Frank Jensen hava altíð havt góð persónlig viðurskifti og hava verið í mongum talvi sum politikarar. Vit práta javnan saman, skemta og stinga hvønn annan - og støkka inn á gólvið hvør hjá øðrum á Christiansborg . Tá er ongin trupulleika at tosa saman sum vaksið fólk og at skilja hvønn annan. Tá er ongin sjónleikur, og allir gekkaskortar eru lagdir til viks.

Hann segði mær undan jólum eftir ein fund á Christiansborg, at hann hevði gjørt eina samrøðu við »socialdemokraternes avis på Færøerne« um fullveldissamráðingarnar. Eg flenti við og segði, at tað verður helst gott undirhald. Eg var sjálvandi fullgreiður um, at nú var tað bara ein sjónleikur tað galt. Nú noyddist hann at fara í gekkaskortin sum fyrrverandi danskur løgmálaráðharri fyri socialdemokratarnar, ið skal levera sínar boðskapir til floksfelagarnar í Føroyum.

Og Frank Jensen spælir júst tann leiklutin, sum hann heldur, at floksfelagarnir á Sosialinum vilja hava hann at spæla. Hann er sera loyalur socialdemokratur, og tí hevur hann bert tríggjar einfaldar boðskapir í samrøðuni:

1. Fullveldisfólk vilja skapa stættarmun í Føroyum.

2. Føroyingar á bygd kunnu ikki klára seg uttan danska hjálp.

3. Landsstýrið hevði fjaldar bandupptakarar á einum fundi, og tann danski løgmálaráðharrin mátti seta tann ólátaða Høgna Hoydal uppá pláss.

## Western-filmurin hjá Frank

Eins og allir Hollywooodfilmar, so er søgan hjá Frank Jensen uppspunnin og partur av einføldum undirhaldi, sum hann roknar við, at hansara floksfelagar í Føroyum vilja hava. Frank Jensen skal skapa myndina av tí góða øðrumegin og tí ónda hinumegin: Tann góða socialdemokratiska stjórnin í Danmark vildi støðga teimum óndu fullveldismonnunum, ið vildu skapa stættarmun. Danmark er verjin hjá føroyskum bygdafólki, ið ikki kunnu klára seg uttan Danmark. Hinumegin málar hann myndina av teimum óndu fullveldisfólkunum sum vilja socialdemokratiska paradísinum ann og vilja gera seg inn á vælferðina hjá tí vanliga føroyinginum - og høvuðsbandittur er Høgni Hoydal, sum enntá brúkar fjaldar bandupptakarar ímóti tí góða og reiðiliga Frank Jensen.

Altso: Júst sum ein skemtiligur Western-filmur, har Frank er Lucky Luke á tí hvíta hestinum - og Høgni Hoydal er tann illsinti Joe Dalton á odda fyri Dalton-bandanum, sum bæði spreingir og stjelur. Og tey mest fanatisku og aggressivu javnaðarfólkini, ið altíð hava livað av at byggja hesa ósonnu myndina upp fyri føroyingum,

> »*Altso: Júst sum ein skemtiligur Western-filmur, har Frank er Lucky Luke á tí hvíta hestinum - og Høgni Hoydal er tann illsinti Joe Dalton á odda fyri Dalton-bandanum, sum bæði spreingir og stjelur…*«

fegnast og fara upp at gartera, tí nú fáa tey aftur váttað allar sínar barnsligu fordómar (hygg bert at, hvør tekur hetta í álvara og gongur óður í lesarabrøvum eftir samrøðuna við Frank).

## Frank misnýttur av Sosialinum

Eg gerist ikki óður inn á Frank Jensen fyri tað. Soleiðis er spælið, sum hann hevur valt at vera partur í. Frank veit tó neyvan, hvussu langt og grovt hansara sjónleikur verður misnýttur í Føroyum. Hann trýr helst, at sjálvt Sosialurin hevur onkur mørk og í minsta lagi eitt vet av journalistiskum morali. Hann fær seg neyvan at trúgva, at í Føroyum kann ein politikari, ið verður pyntaður við heitinum »fyrrverandi løgmálaráðharri«, siga hvat sum helst í Sosialinum, uttan at nakar setur spurnartekin við tað. Um Frank Jensen tildømis segði okkurt við danskar fjølmiðlar, har hann legði ein danskan starvsfelaga undir ymiskt ella viðgjørdi eina politiska samráðing, so hevði ongin fjølmiðil prenta tað uttan at spurt tann persónin, ið álopin varð ella spurt onnur, ið vóru við. Og Frank hevur uttan iva roknað við, at soleiðis fór eisini at verða í hesum føri.

Men Føroyar eru helst einasta pláss í vesturheiminum, har eitt av størstu bløðunum kann varpa forsíðusøgur út, uttan at fylgja teimum mest einføldu grundreglunum í journalistikki og sømiligheit, nevniliga: Kanna tínar keldur. Lat ongantíð eina søgu standa á einum beini, men kanna sjálvur, hvat er fakta í einum máli. Og lat ongantíð úttalilsi hjá einum persóni, sum hevur áhuga í at fáa hendingar at síggja út til sín egna fyrimun, standa einsamøll (og tá er tað líkamikið, um persónurin eitur Frank Jensen ella Høgni Hoydal). Spyr sum minstamark aðrar keldur, og skriva onki, fyrr enn tú hevur fleiri keldur at byggja á.

## Máti skal vera við at undirmeta føroyingar

Sosialurin spyr ikki undirritaða ella onnur fólk, sum hava verið við á fundunum, um pástandirnar hjá Frank Jensen. Kortini varpa teir út forsíðusøgur, sum eru ósannar og verða sendar út til alt Føroya fólk beint undan jólum. Ein føroyskur politikari, sum ikki er í krithúsinum hjá Sosialinum, noyðist tí at nýta stóra orku til støðugt at afturvísa fordómar og ósannar søgur úr Sosialinum. - Ja, enntá av Portalinum hjá Føroya Tele, tí av einihvørjari ófatiligari grund leggur almenna partafelagið, Føroya Tele, sum flestu okkara gjalda til, sína heimasíðu opna fyri grovari flokspolitiskari propaganda frá Sosialinum - hvønn dag í viku og alt samdøgrið.



*– Hví tók Frank Jensen knappliga spurningin um bandupptakaran upp mitt á fundinum í Føroyum, hóast øll høvdu sæð hetta frá byrjan? Hevði hann sagt okkurt, sum hann angraði? Hví noktaði danska stjórnin í felag at skjalfesta alt, sum fór fram ella at gera felags fundarfrágreiðingar, spyr Høgni Hoydal*

Ikki tí. Eg veit, at ongin sum tímir at hugsa seg um, hoppar upp á sjónleikin hjá Frank Jensen. At Nyrup-stjórn vildi støðga fullveldisætlanini, tí hon var »áh so bangin um livistøðið hjá føroyingum á bygd!« Eg meini tað... máti skal vera við at halda føroyingar vera naivar. Fólk kunnu jú bara hugsa um tey krøv, ið danska stjórnin setti føroyingum undir kreppuni, sum bæði skaptu stóran stættarmun og kravdi bygdaskúlar, virkir og sjúkrahús á bygd niðurløgd beinanvegin.

Kortini skal eg fyri søguligu javnvágna hervið skrivliga afturvísa Hollywood-søguni og uppáhaldunum hjá Frank Jensen og Sosialinum og greiða frá míni fatan og mínum metingum. (So mugu fólk sjálvi meta um, hvørjum tey trúgva og hvussu tey gera sær eina heildarmynd av gongdini. Vónandi fáa vit eisini skjótt skrivligar keldur til hendingarnar, sum kunnu gera tað lættari at fáa eina óheftari mynd).

> »*Eg veit, at ongin sum tímir at hugsa seg um, hoppar upp á sjónleikin hjá Frank Jensen. At Nyrup-stjórn vildi støðga fullveldisætlanini, tí hon var »áh so bangin um livistøðið hjá føroyingum á bygd!« Eg meini tað…*«

## Hví vildi Nyrup steðga fullveldisætlanunum?

Tað er yvirhøvur onki løgið í tí, at Nyrup-stjórnin vildi steðga fullveldissamráðingunum. Sjálvandi vil Danmark ikki missa valdið í Føroyum, tí tað hevur alstóran týdning fyri støðu Danmarkar í altjóða heiminum. Bæði í altjóða politikki, hernaðarliga og búskapar-liga. Bara samhandilin millum Føroyar og Danmark gevur danska búskapinum stóran fyrimun, og hernaðarliga hevur Danmark spart milliardaupphæddir í sínum viðurskiftum við Nato, orsakað av Føroyum og Grønlandi. Um gongd kemur á oljuvinnu undir Føroyum, so vil eisini bara tað peningarenslið, sum fer umvegis danska gjaldoyrað og tað samstarv og tey agentur, sum danskar fyritøkur hava í Føroyum, geva stóran fíggarligan fyrimun í danska búskapinum.

Hartil vildi Nyrup-stjórnin sjálvandi ikki játta eina rímiliga samráðing og rímiligar treytir í einum fullveldissáttmála, tí tað hevði kunnað elvt til somu krøv úr Grønlandi. Eisini var Danmark undir stórum trýstum frá sínum samstarvslondum í ES, tí ein virðilig samráðing og ein virðilig avtala millum Danmark og Føroyar, hevði kunnað elvt til, at tjóðir, ið stríðast fyri fullveldi í eitt nú Spania, Italia og í Stórabretlandi, høvudu kunnað nýtt eitt føroyskt fyridømi at leggja trýst á sínar stjórnir.

Hetta vita øll, sum bara kenna eitt lítið sindur til altjóða politikk og hava ein farra av innliti í politiska arbeiðið í danska forsætismálaráðnum.

Og tað er onki at lasta dønum fyri. Soleiðis vildi